# FUNDARBÓK HJÁ
# VÁGS BÝRÁÐ 2013

<table>
<tr><td colspan="2">Fundur nr. 7<br>Tíð: 19. august 2013 kl. 19.00<br>Stað: Kommunuskrivstovan</td><td colspan="2">Skrivari: Petry Joensen</td></tr>
<tr><td>Fastir fundardagar:<br>14. januar, 11. februar, 14. mars,<br>15. apríl, 30. mai, 17. juni,<br>19. august, 23. september,<br>28. oktober, 25. november,<br>19. desember</td><td colspan="2">Møttir:<br>Allir býráðslimir uttan<br>Heri Hjelm</td><td>Ikki á Fundi:<br>Heri Hjelm (fráboðað)</td></tr>
</table>

Heri Hjelm hevur í skrivið dagfest 30. juli 2013 boða frá, at bæði hann og næsti maður á listanum er burturstaddur til komandi býráðsfund 19. august 2013. Hann ynskir at næsti tøki maður á listanum, Páll Lervig, møttir.

Býráðið samtykti einmælt at taka undir við hesum.

**1) Mál nr.: 13/00064**

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram málið viðv. einari møguligari sølu av ogn matr.nr. 611h í Vági.
Fíggjarnevndin hevur á fundi 12. august viðgjørt innkomna boði, og vil mæla býráðnum til at selja ognina fyri 400.000,00 kr..

**Avgerð:**
Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini, fráboðað verður til Sumbiar-, Hovs- og Porkeris kommunu.
Um nevndu kommunur taka undir við hesum, verður sølan avgreidd av umsitingini í samráð við keypara og tey sum í dag búgva í húsinum.

**2) Mál nr.: 13/00170**

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram til seinnu viðgerð, eykajáttan uppá 200.000,00 kr. av innistandandi til stuðul til rentuútreiðslur. Málið var samtykt til fyrru viðgerð 17. juni 2013.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt, at taka undir við hesum.

Undirskriva: